FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Argir, 6. februar 2014

Upprit um loyvisgjald á alivinnu

Bakstøði og inngangur

Landsstýrið setti á vári 2013 ein arbeiðsbólk at koma við tilmæli til serskatt á fiski- og alivinnu.

Seinni skipaði arbeiðsbólkurin seg í tveir arbeiðsbólkar: ein fyri fiskivinnu og ein fyri alivinnu. Hetta uppritið er tilmælið frá alivinnubólkinum.

Hesir hava mannað arbeiðsbólkin fyri alivinnu:

Hans Kári Vang, fulltrúi í Fíggjarmálaráðnum
Atli Suni Leo, ráðgevi í Fíggjarmálaráðnum
Pól E. Egholm, fulltrúi í Vinnumálaráðnum
Atli Gregersen, nevndarlimur í Havbúnaðarfelagnum

Harumframt hevur Stefan í Skorini, ráðgevi fyri Havbúnaðarfelagið, luttikið í arbeiðinum.

Uppritið er skipað soleiðis, at fyrsti partur er tilmælið frá arbeiðsbólkinum, og í øðrum parti verður gjørd ein stutt samanbering millum alivinnuna og aðrar vinnur. Í triðja parti verður sagt frá, hvørji atlit arbeiðsbólkurin hevur lagt serligan dent á í arbeiðinum, og í fjórða parti verður sagt frá fyrimunum og vansum við ymiskum hættum at leggja loyvisgjald á alivinnu. At enda verður í fimta parti greitt meira ítøkiliga frá sjálvum tilmælinum.

1. Tilmæli frá arbeiðsbólkinum

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at frægastu hættir at leggja loyvisgjald á alivinnuna eru:

- **Tøkugjald:** har alarin rindar eitt fast avgjald av marknaðarvirðinum á tøkuni í sambandi við, at alifiskur verður tikin.
- **Loyvisskattur:** ið er sama skipan, sum galdandi tilfeingis/loyvisskattur. Tað vil siga, at alifyritøkur rinda ein eyka felagsskatt.

Arbeiðsbólkurin mælir til eina loysn, har báðir hættir verða brúktir. Mælt verður til at seta í verk eitt loyvisgjald, sum verður rindað sambært hesum leisti:

- Rindað verður 0,5% í tøkugjaldi
- Rindað verður 4,5% í loyvisskatti

Arbeiðsbólkurin er eisini samdur um, at alivinnan skal hava kappingarførar og tryggar karmar at virka undir, og verður tískil mælt til, at loyvisgjaldið verður hildið óbroytt í eitt áramál.

2. Støðan hjá alivinnuni í mun til aðrar vinnur

Orsøkin til politiska ynskið um at leggja eykaskatt á alivinnuna er, at talan er um vinnu, sum hevur framíhjárættindi í sínum virksemi. Tey framíhjárættindi, sum alivinnan hevur, eru ókeypis atgongd til føroysk aliøki.

Niðanfyri verður í stuttum greitt frá, hvørja støðu alivinnan annars hevur samanborið við aðrar vinnur.

Alivinnan hevur eina serliga skattaskipan, sum merkir, at livandi alifiskur ikki verður taldur við í inntøkuuppgerðina við tí virði, sum fiskurin hevur, tá inntøkuárið gongur út, men verður skattaður við tøku. Sama skipan er galdandi í Noregi, og orsøkin er, at váðin við at hava fiskin svimjandi í sjónum er stórur. Hetta lækkar ikki samlaða skattin hjá alivinnuni, men bøtir um gjaldførið. Akkumulerøða upphæddin við árslok 2012 var áleið 170 mió. kr.

Landið letur árliga slakar 10 mió. kr. í stuðulsjáttan til P/F Fiskaaling, hvørs endamál er gransking, ið skal menna alivinnuna. Norska alivinnan rindar á leið 1 prosent av umsetninginum til gransking og marknaðarføring.

Alivinnan er annars ein stuðulsfrí vinna. Hon fær ongan beinleiðis almennan stuðul og rindar fyri almennar tænastur og lógarkravd eftirlit, sum almennir stovnar fremja fyri vinnuna. Hinvegin rindar landið fyri fiskivinnuna einar 60 mió. kr. árliga fyri Fiskiveiðieftirlit og Havstovu.

Eisini er vert at nevna, at arbeiðsmegin í alivinnuni ikki hevur skattafyrimunir ella afturbering, eins og galdandi er fyri fiskiskap, sigling í FAS ella uttanlandsarbeiði á sjógvi og landi. Hesi viðurskifti gera tað truplari hjá alivinnuni at kappast um arbeiðsmegina, og hetta økir um lønartrýstið í alivinnuni.

Alivinnan framleiðir sjálv allar sínar vørur og selur tær í altjóða kapping. Alivinnan er ikki ein tilfeingisvinna, av tí at hon ikki troytir eitt avmarkað tilfeingi eins og fiski- og oljuvinnan. Nøgdin av alifiski, sum kann framleiðast í heiminum, er harumframt at meta sum óavmarkað og hevur verið í støðugum vøkstri seinastu mongu áratíggjuni.

Hinvegin hevur alivinnan – eins og fiskivinnan – síðan 2011 rindað tilfeingis/loyviskatt á 2,5% av skattskyldugu inntøkuni omanfyri 1 mió. kr. Frá 1. januar 2014 hækkaði hesin eykaskattur upp í 7%.

Alivinnan í Føroyum kann ikki keypa heilivág, koppingarevni og avlúsingarevni á altjóða marknaðinum, tí at einkarætturin hjá Apotekinum forðar hesum. Hetta hevur við sær ein munandi meirkostnað sambært alivinnuni. Alivinnan í Noregi og Skotlandi hevur møguleika at keypa heilivág og avlúsingarevni frá fleiri ymsum veitarum, sum kappast um at veita besta prísin og bestu tænastuna.

3. Atlit í sambandi við loyvisgjald

Endamálið við arbeiðinum er at finna fram til ein hóskandi hátt, at leggja loyvisgjald á alivinnuna. Í hesum sambandi hevur arbeiðsbólkurin lagt serligan dent á hesi atlit:

1. at gjaldið er hóskandi, sæð í mun til langtíðarvirðið á teimum framíhjárættindum, ið alivinnan hevur. Tað er umráðandi, at gjaldið ikki einans verður ásett eftir, at alivinnan seinnu árini hevur havt stór yvirskot.

2. at gjaldið serliga verður goldið, tá ið vinnan hevur yvirskot, meðan minni verður goldið, tá vinnan hevur undirskot, soleiðis at vinnan hevur gjaldføri at rinda gjaldið við.
3. at gjaldið í minst møguligan mun gevur møguleika fyri skattahugsan (sum t.d. at flyta yvirskot til atknýtt feløg við "transfer pricing" ella "tunnari kapitalisering").
4. at gjaldið tekur hædd fyri, at føroyskar alifyritøkur í dag hava felags fyrimun av at samstarva og deila vitan sínámillum. Tí um so er, at hægri yvirskot í einari fyritøku hevur við sær hægri gjald á hinar fyritøkurnar, kann tað minka um samstarvið og vitanardeilingina.
5. at gjaldið ikki ger tað truplari at fáa í lag skynsama heilsufrøðiliga samskipan av føroyskari aling.
6. at gjaldið ikki ger tað truplari hjá einstøku alifyritøkunum at skipa sítt virksemi í eina burðardygga eind í einum landafrøðiliga samanhangandi øki.
7. at gjaldið er einfalt at umsita og gjøgnumskoða bæði fyri vinnuna og myndugleikarnar.
8. at gjaldið í mest møguligan mun er óheft av bygnaðinum í alifyritøkuni, og hvussu nógv vøran verður tilvirkað. Tað vil siga, at gjaldið eigur at verða lagt á ta virðisøkingina, sum fer fram til og við kryvjing. Gjald eigur ikki at verða lagt á tilvirking av alifiski á landi, tí hesin parturin av virkseminum hevur ongi framíhjárættindi.
9. at gjaldið tekur atlit til altjóða kappingarførið hjá føroysku alivinnuni.

4. Hættir at áleggja loyvisgjald

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt ymiskar hættir at áleggja loyvisgjald. Teir eru:

1. Uppboðssøla av loyvum
2. Tilfeingisgjald eftir íslendskum leisti
3. Fast loyvisgjald fyri aliloyvi
4. Eyka felagskattur
5. Tøkugjald

Greitt verður frá niðurstøðunum niðanfyri.

4.1 Fyrimunir og vansar við uppboðssølu

Her verður hugsað um eina skipan, har rætturin at brúka ein føroyskan alifjørð verður útboðin á uppboðssølu við jøvnum millumbilum (t.d. hvørt 10, ella 20 ár).

Teoretiskt sæð vildi ein slík skipan undir "fullkomnum viðurskiftum" (t.e. full kapping, ongin óvissa, full og symmetrisk informatión, ongin politiskur váði, full atgongd til fígging, osv.) havt við sær, at alt virðið á aliloyvinum hevði endað í landskassanum. Hetta er tí, at fyritøkurnar undir slíkum viðurskiftum høvdu boðið prísin akkurát so høgt upp, at tær høvdu mist allan tann forvæntaða vinningin, sum liggur omanfyri tað, sum væntandi kann forvinnast í øðrum vinnugreinum; vinningurin hevði í staðin farið í landskassan. Somuleiðis kann ein uppboðssøla tryggja gjøgnumskygni í sambandi við útlutan av nýggjum aliøkjum.

Viðurskifti, sum serliga tala í móti uppboðssølu eru:

- at talan kann gerast um avtalað spæl, ella í hvussu er sera lítla kapping, í sambandi við boðgeving, tí landið er so lítið, at talið av aktørum longu er, og altíð vil verða, sera avmarkað. Harumframt eru avmarkingar fyri útlendskum ognarskapi. Eisini er hámark fyri, hvussu stóran part av samlaðu loyvunum ein fyritøka kann eiga.
- at ein uppboðssøla kann hava við sær, at tann skipanin, sum er í dag, har fyritøkurnar hava skipað seg í landafrøðiliga samanhangandi aliøki, kann fara fyri bakka. Úrslitið

kann gerast eitt meira óstøðugt og ósamanhangandi "landakort", har eindirnar gerast minni burðardyggar og heilsufrøðiligu vandarnir gerast størri, tí truplari verður at samskipa heilsufrøðilig átøk.
- at samstarvið og vitanardeilingin í føroysku alivinnuni steðgar, tí fyritøkurnar nú fáa áhuga í at fjala sína vitan fyri øðrum føroyskum alifyritøkum, tí hesar nú gerast beinleiðis kappingarneytar í staðin fyri samstarvsfelagar.
- at tað kann skapa óneyðugan ótryggleika og óvissu í vinnuni, um vinnan regluliga má tryggja sær framhaldandi atgongd til aliøkið. Hetta kann elva til, at vinnan fer at hugsa meira stuttsiktað, í staðin fyri at arbeiða eftir eini langtíðar strategi.
- at áhugin hjá alifyritøkuni fyri at gera íløgur ella ábøtur á aliøki minkar sum dagurin fyri uppboðssølu nærkast, ella uppundir, at fyritøkan stendur til at missa loyvið.
- at talan kann gerast um, at aliloyvi vegna spekulatión ella skeiva informatión, verða seld nógv dýrari enn raksturin kann bera.
- at tað verður hin mest váðafúsi, sum bjóðar hægst og fær alifjørðin, heldur enn hin dugnaligasti alarin.
- at tað longu er farin ein miðsavning fram í alivinnuni, sum hevur havt við sær, at flest øll aliloyvi longu eru handlaði í sambandi við, at alifyritøkur hava uppkeypt partapeningin í øðrum alifyritøkum.

Samanumtikið metir arbeiðsbólkurin ikki, at uppboðssøla er rætti hátturin at leggja loyvisgjald á alivinnuna.

4.2 Fyrimunir og vansar við íslendsku skipanini

Í Íslandi er sett í verk ein serlig skattaskipan at skatta yvirnormalt avkast frá m.a. fiskivinnu og vatnorkuframleiðslu. Henda skipan er tó ikki galdandi fyri íslendsku alivinnuna.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt møguleikan fyri at seta líknandi skipan í verk fyri føroysku alivinnuna.

Henda skipan hevði havt við sær, at alivinnan hevði fingið álagt eitt árligt gjald pr. kg. av laksi. Hetta gjald hevði verið roknað út frá samlaða yvirskotinum í føroysku alivinnuni. Sum skattagrundalag hevði verið brúkt EBITDA (vinningur áðrenn fíggjarkostnað, skatt, frádráttir og avskrivingar) fyri alla føroysku alivinnuna, har einasti frádráttur hevði verið ein roknaður fíggjarkostnaður fyri rakstrartól.

Teoretiskt skuldi ein slík skattaskipan einans skatta yvirnormalt avkast, meðan normala avkastið sleppur undan skatti. Skatturin kann sostatt setast til 100%, uttan at hetta ávirkar virksemi hjá fyritøkunum. Men hetta er tó – millum annað – treytað av, at roknaði frádrátturin fyri fíggjarkostnaðin av rakstrartólunum verður settur rætt.

Fyrimunurin við slíkari skipan er, at gjaldið verður roknað fyri samlaðu vinnuna, og at einstaka fyritøkan, tí ikki kann ávirka sítt egna gjald. Men arbeiðsbólkurin metir ikki, at hesin fyrimunur er galdandi í føroysku alivinnuni, tí talið av aktørum er so avmarkað. Fyritøkurnar høvdu tí, í stóran mun, havt áhuga í ymiskum sløgum av skattahugsan.

Í dag er tað soleiðis, at føroyska alivinnan hevur felags fyrimun av at samstarva og deila vitan sína millum. Hetta verður mett sum avgerandi fyri menningina av føroysku alivinnuni. Íslendska skipanin hevði havt við sær, at vitanardeilingin og samstarvið hevði steðgað, tí nú hevur tað við sær hægri skatt á einstøku fyritøkuna, um tað gongst hinum føroysku alifyritøkunum væl.

Eisini er íslendska skipanin soleiðis, at árliga kilogjaldið verður ásett við støði í yvirskotinum tvey ár frammanundan. Tað vil siga, at kilogjaldið fyri 2014, hevði verið ásett sambært gongdini í alivinnuni í 2012. Er munandi niðurgongd í vinnuni, kann hetta hava við sær, at vinnan ikki hevur gjaldføri at rinda skattin við.

Tað kann eisini hugsast ein støða, har ein alifyritøka verður rakt av sjúku ella øðrum trupulleikum, meðan hinar sleppa undan. Íslendska skipanin hevði havt við sær, at tann rakta alifyritøkan hevði verið áløgd ein eykaskatt, hóast hon hevur koyrt við stórum undirskoti í fleiri ár, meðan hinar fyritøkurnar høvdu fingið skattalætta, tí ein fyritøka hevur undirskot.

Samanumtikið metir arbeiðsbólkurin ikki, at íslendska skipanin er rætti hátturin at leggja loyvisgjald á alivinnuna.

Annars hevur arbeiðsbólkurin ikki kannað aðrar møguleikar fyri líknandi serskattaskipanum, ið skatta yvirnormalt avkast.

4.3 Fyrimunir og vansar við føstum loyvisgjaldi

Her verður hugsað um eina skipan, har tað við jøvnum millumbilum verður gjørd ein meting av leiguvirðinum á aliøkinum, sum so verður grundarlag fyri einum árligum loyvisgjaldi.

Fyrimunurin við slíkari skipan er, at tað er beinleiðis samband millum gjaldið og tey framíhjárættindi, sum vinnan hevur.

Viðurskifti, sum serliga tala ímóti eru:

- at tað kann vísa seg sera torført í verki at áseta leiguvirðið á aliøkinum.
- at gjaldføri hjá vinnuni versnar, tí nú skal rindast fast gjald, óansæð hvussu gongdin er í vinnuni.

Leiguvirðið á einum aliøki er ikki støðugt, men broytist í mun til viðurskiftini kring alivinnuna so sum støddd á aliøki og onnur landafrøðilig viðurskifti, hvussu nógv verður sett út í aliøkinum og onnur lívfrøðilig vakstrarviðurskifti, sjúkustøðan í aliøkinum og onnur heilsufrøðilig viðurskifti, og søluprísur og onnur marknaðarviðurskifti. Hetta eru viðurskifti, sum hava týdning fyri metingina av leiguvirðinum, og sum tískil ger hetta til eina rættiliga torføra uppgávu at fremja í verki.

Samanumtikið metir arbeiðsbólkurin ikki, at ein skipan við føstum loyvisgjaldi er frægasta loysnin.

4.4 Fyrimunir og vansar við eyka felagsskatti

Her verður hugsað um skipanir, har feløg, ið reka alivinnu, umframt vanliga felagsskattin (18%) verða álagdar at rinda ein eykaskatt av skattskyldugu inntøkuni. Tað vil siga, ein hækkaður felagsskattur.

Slíkar skipanir hava sínar fyrimunir. Fyrisitingarliga er hetta uttan iva lættasta loysnin, tí talan er um at ein skatt, sum finst frammanundan, og sum allar partar eru kunnugir við. Eisini er talan um skatt sum verður rindaður samstundis, sum vinnan hevur yvirskot.

Flestu alifyritøkur eru skipaðar sum samtøk við fleiri feløgum, ið eisini reka annað virksemi enn aling. Samtøkini verða í dag samskattaði í einum felags móðurfelag.[1] Hugsast kunnu sostatt tvær ymiskar loysnir:

1. at leggja serskatt á alt samtakið. Tað vil siga, at serskatturin rakar eisini móðurfelagið og øll feløg, sum móðurfelagið saman við dótturfeløgum eigur.
2. at leggja serskatt einans á tey feløg í samtakinum, sum beinleiðis reka alivinnu.

Báðar loysnir hava sínar fyrimunir og vansar. Fyrra loysnin verjir skattagrundarlagið undir serskattinum móti skattahugsan, soleiðis at tað ikki ber til við innanhýsis keypi og sølu (*transfer pricing*), ella við innanhýsis lántøku (*tunnari kapitalisering*), at flyta yvirskot úr teimum feløgum í samtakinum, sum rinda serskatt, yvir í tann partin, sum ikki rindar serskatt. Men hinvegin hevur henda loysnin við sær, at serskattur eisini verður lagdur á tann partin av virkseminum, sum ongi framíhjárættindi hevur, og sum tí fær verri treytir enn onnur líknandi feløg. Núverandi skattalóg hevur ongar ásetingar viðvíkjandi *transfer pricing* og *tunnari kapitalisering* í teimum førum, tá ið talan er um viðurskifti millum tvey føroysk feløg. Reglurnar í skattalógini (§ 37a og 37b) snúgva seg einans um viðurskifti millum føroyskt og útlendskt felag.

Seinna loysnin verður í dag brúkt í samband við galdandi tilfeingis/loyvisskattin. Tilfeingis/loyvisskattur verður einans lagdur á tey feløg í einum samtaki, sum fáast við fiskiskap ella alivinnu. Fyri alivinnuna hevur hetta við sær, at skatturin einans verður lagdur á feløg, ið reka smoltstøðir ella fáast við aling og kryvjing. Tað vil siga, at tilfeingis/loyvisskattur verður ikki lagdur á feløg, sum fáast við tilvirking av alifiski, hóast hesi feløg annars verða samskattaði í sama fyrisitingarfelag.

Arbeiðsbólkurin metir, at galdandi loysn við tilfeingis/loyvisskatti er frægara loysnin. Mett verður ikki, at tað er skynsamt at leggja eykaskatt á alt samtakið. Tí hetta hevur, sum sagt, við sær, at serskattur eisini verður lagdur á tann partin av virkseminum, sum ongi framíhjárættindi hevur, og havandi í huga, at samtøk, sum reka alivinnu, eiga fleiri feløg, sum virka innan heilt aðrar vinnugreinar, hevði tað kunnað darvað føroyska vinnulívinum í at skipa seg optimalt frameftir.

Seinna loysnin hevur, sum fyrr nevnt, við sær, at feløgini kunnu hava áhuga í skattahugsan. Í hesum sambandi verður mælt til, at reglurnar í skattalógini um *transfer pricing* og *tunna kapitalisering* verða víðkaðar til eisini at snúgva seg um viðurskifti millum tvey føroysk feløg.

Eisini metir arbeiðsbólkurin, at tilmælti loyvisskatturin er passaliga lágur. Hetta skuldi avmarkað áhugan fyri stórvegis skattahugsan.

Fyri at gera loyvisskattin meira einfaldan, mælir arbeiðsbólkurin til, at botnfrádrátturin á 1 mió. kr. í núverandi tilfeingis/lovisskatti verður strikaður.

Viðvíkjandi einari loysn við hægri felagskatti er umráðandi at gera vart við, at hóast alivinnan í dag fær ávís framíhjárættindi, so er tað als ikki vist, at hetta hevur við sær, at skattskylduga inntøkan í alivinnunu gerst nógv størri enn í øðrum vinnum. Ofta hava framíhjárættindi við sær, at ein vinna verður minni produktiv og kostnaðareffektiv enn annars. Hetta kann hava við

[1] Samskatting er sjálvboðin, og søkjast kann um tað sbrt. § 9 í skattalógini. Treytin er, at móðurfelagið, antin einsamalt ella saman dótturfeløgum, eigur allan partapeningin í teimum dótturfeløgum, sum samskattingin viðvíkir. Annars verður víst til kunngerð nr. 104 frá 28. Juni 2001 um samskatting av feløgum.

sær, at tað ikki altíð er ein samanhangur millum framíhjárættindi og stórt yvirskot. Men, í hesum sambandi má viðmerkjast, at alivinnan er merkt av stórum sveiggjum, og tá tað javnan gongur illa í vinnuni skundar hetta undir ein effektivan rakstur.

Samanumtikið metir arbeiðsbólkinum, at núverandi skipan við loyvisskatti er ein brúkilig loysn í sambandi við at leggja loyvisgjald á alivinnuna.

4.5 Fyrimunir og vansar við tøkugjaldi

Her verður hugsað um eina skipan, har rindað verður eitt fast gjald av virðinum á tøku av alifiski. Virðið verður roknað sambært avroknaða altjóða marknaðarprísinum í tíðarskeiðnum, sum tøkan fer fram.

Tað vil siga, at avgjaldið hjá fyritøku A fyri tíðarskeið x verður roknað soleiðis:

$$Gjald_{tíðarskeið\ x}^{fyritøka\ A} = Marknaðarprísur\ pr.kg_{tíðarskeið\ x} \cdot Tøka\ í\ kg_{tíðarskeið\ x}^{Fyritøka\ A} \cdot Avgjald\ (\%)$$

Tað finnast ymiskir altjóða miðal marknaðarprísir fyri kruvdan feskan laks, sum kundu verið brúktir í hesum sambandi. Til dømis norski NOS-prísurin, sum verður uppgjørdur sum miðalprísur pr. viku, mánað og ár.

Er talan um kravda tøku vegna sjúku, eigur onki avgjald at verða rindað.

Arbeiðsbólkurin metir, at eitt slíkt tøkugjald hevur ávísar fyrimunir:

- Gjaldið er einfalt og lætt at umsita bæði hjá vinnuni og hjá myndugleikunum.
- Gjaldið elvir ikki til skattahugsan, tí har eru ongir møguleikar fyri at minka um gjaldið við nøkrum frádráttum, avskrivingum ella líknandi.
- Gjaldið ávirkar ikki samstarvið og vitanardeilingina millum føroyskar alifyritøkur, tí gjaldið hjá einstøku fyritøkuni er óheft av úrslitinum hjá hinum føroysku alifyritøkunum.
- Gjaldið verður rindað samstundis sum fyritøkan tekur laks og hevur gjaldføri at rinda skattin við.
- Gjaldið verður einans lagt á virðisøkingina í sjónum, meðan møgulig virðisøking, sum stendst av tilvirking á landi, ikki verður skattað.

Størsti vansin er, at gjaldið ikki tekur hædd fyri kostnaðinum hjá alifyritøkunum; gjaldið skal rindast uttan mun til um vinnan hevur yvirskot ella undirskot.

Men sum heild verður mett, at hesin trupulleikin ikki er so stórur um bert gjaldið verður hildið á einum rímiligum støði, tí uppá sikt kann roknast við, at lutfallið millum miðalprísin og samlaða miðalkostnaðin er nøkulunda støðugt, og hinvegin skundar henda loysnin eisini undir ein meira kostnaðareffektivan rakstur.

Samanumtikið metir arbeiðsbólkurin, at eitt tøkugjald er ein brúkiligur háttur at leggja loyvisgjald á alivinnuna. Verður tøkugjald rindað, eiga alifyritøkurnar at fáa frádrátt fyri gjaldið í skattskyldugu inntøkuni.


5. Tilmælið frá arbeiðsbólkinum

Mælt verður til, at alivinnan frameftir verður áløgd at rinda eitt loyvisgjald eftir hesum leisti:

1. Rindað verður eitt tøkugjald á 0,5% av virðinum á tøkuni av laksi. Sum avgjaldsgrundarlag verður brúkt tøkan í kg falda við altjóða marknaðarprísinum í tíðarskeiðnum, sum tøkan fer fram.
2. Feløg, ið reka alivinnu, rinda frameftir ein eykaskatt á 4,5% av skattskyldugu inntøkuni. Hendan skipan samsvarar við galdandi tilfeingis/loyvisskatt, men mælt verður til at avtaka botnfrádráttin á 1 mió. kr.

5.1 Inntøka frá tøkugjaldinum

Á myndini niðanfyri verður mett um, hvat samlaða avgjaldsgrundarlagið fyri einum tøkugjaldi hevði verið undanfarin ár.



Tað sæst, at talan er um eitt sera óstøðugt avgjaldsgrundarlag. Seinastu árini hevði avgjaldsgrundarlagið verið omanfyri 1,5 mia. kr. Í 2013 hevði verið talan um heilar 2,3 mia. kr. Men árini 2005-2007 og 1996-1998 hevði grundarlagið verið væl minni; niðanfyri ½ mia. kr. Árini 1999-2004 hevði talan verið um einar 700-800 mió. kr.

Tað sæst eisini, at tað í størri mun er tøkan, enn prísurin, sum er avgerandi fyri, hvussu stórt avgjaldsgrundarlagið verður. Hóast stór sveiggj, hevur árligi miðalprísurin ligið rættiliga støðugt millum 20 og 30 kr. síðan 1996. Men tøkan er sera ymisk, úr 10.000 tons tey ringastu árini, og upp í omanfyri 60.000 tons seinastu árini.

Um hædd verður tikin fyri, at feløgini fáa frádrátt fyri tøkugjaldið í skattskyldugu inntøkuni, vildi eitt tøkugjald seinastu árini, havt við sær eina meirinntøku fyri landskassan á einar 10-13 mió. kr. fyri hvørt avgjaldsprosent. Í 2013 vildi verið talan um áleið 19,5 mió. kr. Men onnur tíðarskeið er upphæddin væl lægri; áleið 2-3 mió. kr. fyri hvørt avgjaldsprosent.

Tilmælið frá bólkinum er at seta tøkuavgjaldið til 0,5%, hetta svarar til áleið 9,7 mió. kr. árliga sambært núverandi gongd í alivinnuni. Men sigast skal, at gongdin seinnu árini hevur verið serliga góð, so uppá langt sikt verður mett, at avgjaldið í miðal helst verður lægri.

Mælt verður til, at alifyritøkur fáa frádrátt fyri tøkugjaldið í skattskyldugu inntøkuni, og at atvinnukommunurnar, sum fáa 30% av felagsskattinum, verða hildnar skaðaleysar fyri missinum í felagsskatti vegna frádráttin.

5.2 Inntøka frá loyvisskatti

Talvan niðanfyri vísur skattagrundarlagið undir loyvisskattinum seinastu árini. Eisini er gjørd ein meting fyri 2014. Mett verður, at skattagrundarlagið undir loyvisskattinum í 2014 verður áleið 6,5 mió. kr. pr. prosent. Hetta er áleið tað sama sum í 2013. Men árini frammanundan var skattagrundarlagið væl minni, og hetta stavar serliga frá roknskaparligum goymslubroytingum í sambandi við útseting av alifiski. Men frá 2013 og frameftir verður ikki roknað við stórvegis goymslubroytingum, og hetta økir skattskyldugu inntøkuna hjá alivinnuni munandi.

Skattainntøka frá loyvisskatti, (mió. kr.)				
	2011	***2012***	***2013***	***Meting 2014***
Skattagrundarlag	53,4	17,4	659,0	650,0
Pr. prosent	0,5	0,2	6,6	6,5
Inntøka við 4,5%	**2,4**	**0,8**	**29,7**	**29,3**

Tilmælið frá bólkinum er at seta loyvisskattin til 4,5%, og hetta svarar til áleið 29 mió. kr. árliga sambært núverandi gongd í alivinnuni. Men, sum sagt, hevur gongdin seinnu árini verið serliga góð, so uppá langt sikt verður avgjaldið í miðal helst nakað lægri.

5.3 Samlað inntøka frá loyvisgjaldinum

Sambært núverandi gongd í alivinnuni verður mett, at loyvisgjaldið hevur við sær eina inntøku til landskassan á áleið 39 mió. kr. árliga. Av hesum stava slakar 10 mió. kr. frá tøkugjaldinum og góðar 29 mió. kr. frá eykaskattinum.

Men, sum sagt, hevur gongdin seinnu árini hevur verið serliga góð, so uppá langt sikt verður mett, at loyvisgjaldið í miðal verður nakað lægri.

5.4 Viðmerkingar frá arbeiðsbólkinum

Arbeiðsbólkurin er samdur um tilmælið. Tó vildu umboðini fyri Fíggjarmálaráðið og Vinnumálaráðið heldur mælt til eina loysn við hægri tøkugjaldi (2 - 3%), men ongum eykaskatti. Havbúnaðarfelagið vildi heldur mælt til eina loysn við ongum tøkugjaldi, men einans eykaskatti.

Tilmælið er sostatt ein semja millum hesi bæði sjónarmið.

Nevndin í Føroya Havbúnaðarfelag tekur undir við tilmælinum treytað av, at einkarætturin hjá Apotekinum at selja heilivág til alivinnuna verður avtikin. Hetta fyri at javnseta føroyska alivinnu við alivinnu í grannalondunum.

Undirskriftir:

Fíggjarmálaráðið 7. februar 2014

Hans Kári Vang

Atli Gregersen

Atli Suni Leo

Pól E. Egholm